TÓRSHAVNAR KOMMUNA

**Leiðreglur um lán og brúk av hallum v.m. hjá Ítróttaanleggum í Tórshavnar kommunu**

**Innleiðing og endamál**
§ 1. Hesar leiðreglur skulu tryggja, at feløg, borgarar, fyrisiting, stovnar o.o. hava greiðar reglur fyri lán og brúk av hallum, hølum v.m. hjá Ítróttaanleggum.
Stk. 2. Endamálið er at tryggja, at hølir og hallir verða nýtt so munagott og skynsamt sum gjørligt og styðja upp undir eitt virkið ítrótta- og kappingarvirksemi í kommununi. Harumframt at stuðla og eggja til ein virknan lívsstíl við rørslu og felagsskapi og í aðru atløgu at veita karmar til tiltøk innan handil, mentan, frítíð o.a.
Stk. 3. Umframt hesar leiðreglur kunnu serstakar reglur ásetast fyri einstøk høli v.m., ið eru tøkar á heimasíðu hjá kommununi ella ásettar í avtalu.

**Almennar ásetingar um tillutan av hallartímum**
§ 2. Tillutanin av tímum í hølum og hallum tekur støði í høvuðsendamálinum (sí www.hallirvallir.fo) við ávísu høllini, umframt endamálinum og vavinum á virkseminum hjá feløgunum og øðrum brúkarum.
Stk. 2. Hallartímar verða fyrst og fremst tillutaðir til virksemi, sum vanliga verður íðkað innandura. Tøkar tíðir útyvir hetta verða lutaðar til virksemi, sum vanliga er uttandura, tó fyrst og fremst til børn og ung.
Stk. 3. Tíðir, ið ikki eru í brúk, verða gjørdar tøkar á www.hallirvallir.fo hjá øðrum at bíleggja. (pay-and-play).
Stk. 4. Tillutan av tímum til ítróttafeløg verður býtt eftir stødd, t.v.s. hvussu mong kappingarlið hvørt ítróttafelag innan somu ítróttagrein hevur.
Stk. 5. Ítróttaanlegg saman við ítróttafeløgunum gera ein býtislykil út frá meginreglunum fyri raðfesting av tímabýti.

**Raðfesting í sambandi við tillutan av føstum hallartíðum**
§ 3.
1. Feløg við ítróttavirksemi fyri børn og ung
2. Feløg við ítróttavirksemi fyri vaksin
3. Skúlar/frítíðarskúlar
4. Eldraøkið

Fram til kl. 20 verður virksemi fyri børn og ung við venjara raðfest fram um virksemi uttan venjara ella fyri vaksin.

**Raðfesting av tímaútbýti (hallartímar) millum ítróttafeløgini**
§ 4. Frá miðjum august byrja vetrarvenjingar og halda tær fram til seinast í apríl mánaði. Feløgini verða kallað á fund móti endanum av mai mánaði, har feløgini fáa eina fyribils ábending um, hvussu nógvar tímar tey fáa. Endaliga býtið verður latið seinast í juni mánaði.
Stk. 2. Sersambond/menningarsambond skulu hava bílagt eina fyribils ætlan yvir allar tíðir til kappingar og dystir áðrenn tann 15. august á hvørjum ári, sum skal leggjast beinleiðis á www.hallirvallir.fo. Endaliga skráin skal liggja inni tann 1. oktober. Eftir tann 1. oktober hava sersambond/menningarsambond ikki fyrsta rætt at bíleggja tíðir longur.
Stk. 3. Tíðir, ið ikki verða brúktar, skulu avlýsast 1 mánað áðrenn ávísu tíðina, og verður freistin

ikki hildin, skulu sersambondini gjalda fyri tíðina.
Stk. 4. Tá tímar verða býttir út, verður lagt upp fyri hesum:
1. Stødd á kappingaríðkarum/-liðum.
2. Hvør høll, ið hóskar best til ávísu ítróttagrein og nærumhvørvi hjá feløgunum.
3. Hvussu nógvar tímar hvørt felag skal fáa, her verður t.d. hugsað um hondbóltin og flogbóltin, sum skal býtast til A, B, C, D í hvørjum aldursbólki sær.
4. Hvussu nógvar ítróttagreinir býtast skal til.
5. At hvør einstøk ítróttagrein í mun til skilabestu venjing fær nøktandi útlutan. Hetta verður gjørt við at sersambond/menningarsambond innan hvørja ítróttagrein koma við tilmæli til nevndu skilabestu venjing. Út frá tilmælum, har mælt verður til, at børn frá 8 ára aldri og upp til tannáringaaldur, skulu royna so fjølbroytta ítróttagreinar sum gjørligt.
6. Einki ítróttafelag fær meir enn ásetta markið av tímum, ið er 35 venjingartímar um vikuna. Hetta er í tíðarrúminum millum kl. 15.00-22.00.
7. Um mett verður, at felag hevur tørv á fleiri tímum, kann felagið fáa tímar í fimleikahallunum ella, um pláss er fyri tí, í ítróttahøllum millum klokkan 14.00-15.00, og verður hetta roknað sum ein hálvur tími í samlaðu útlutan.
Stk. 5. Ítróttafeløg bíleggja summarvenjingar inni á www.hallirvallir.fo, og skal hetta gerast áðrenn 15. apríl.

**Hallarnýtsla**
§ 5. Minstakravið av luttakarum fyri leigu av tímum í ítróttahøll og fimleikahøll. Avtala kann gerast uttan um hesi krøv, og skal tað samskiftast við Ítróttaanlegg.

| **Ítróttagrein** | **Ítróttahallir** | **Minni- og fimleika hallir** |
|---|---|---|
| Badminton | 2 til hvønn bana | 2 til hvønn bana |
| Innandura fótbóltur | 10 | 6 |
| Hondbóltur | 14 | 7 |
| Flogbóltur | 12 til hvønn bana (eisini til langbana) | 10 til hvønn bana |
| Kurvabóltur | 10 | 10 |
| Estetiskur fimleikur | 7 | 7 |
| Amboðsfimleikur | 20 | 12 |

Stk. 2. Eftirlit verður hildið við, um feløg fylgja hesum krøvum. Um krøvini ikki verða fylgd, fær felagið skrivliga ávaring. Um tað endurtekur seg, missur felagið rættindini til ásetta tíman/tímarnar.
Stk. 3. Flogbóltur/badminton fáa ein hálvan tíma eyka fyri hvørja ferð tey bóka inn, uttan at tað telur sum venjingartíðir. Hetta fyri at gera klárt, at seta netini upp og taka tey niður aftur.
Raðfesting í sambandi við nýtslu av hallum og hølum til annað enn ítróttaendamál
§ 6. Konsertir, messur, samkomur, aðrir felagsskapir o.a. hava eitt fast skema fyri árið, ið Ítróttaanlegg dagførir so hvørt.
Stk. 2. Leigarin kann biðja um ávísa høll til eitt tiltak, tó kann leiðslan finna best hóskandi høli til endamálið.

**Innrætting og hentleikar**
§ 6. Høli verða sett til taks við ljósi, hita, umklæðingar- og brúsurúmi og reingerð.
Stk. 2. Brúkarin kann fáa tónleikaanlegg við mikrofon at brúka, um tørvur er á tí, og skal boðast samskiparanum frá hesum, tá bílagt verður.
Stk. 3. Um krav er, at borð og stólar verða uppsett til smærri tiltøk, ber til at avtala hetta við leiðsluna við eyka kostnaði.

**Endurgjaldsábyrgd**
§ 7. Brúkarar av hølum og anleggum kunnu áleggjast endurgjaldsábyrgd í sambandi við misrøkt av hølum, anleggum og útgerð. Herundir um hølir ikki verða læst sambært galdandi ásetingum og í sambandi við vantandi reinføri, og um tað ikki verður tikið upp eftir sær.

**Upplatingartíðir**
§ 8. Fyri ymisku hølini verða nærri ásetingar gjørdar um, nær til ber at brúka hølini. Hetta sæst í bíleggingarskipanini.
Stk. 2. Í sambandi við hallartíðir er galdandi, at umklæðingarrúm eru tøk í rímiligari tíð áðrenn og eftir venjing v.m.

Avmarkingar
§ 9. Brúkarar mugu tola, at tað kann koma fyri, at tillutaðar tíðir verða tiknar aftur í sambandi við ávísar kappingar, stevnur, val o.a. Fráboðanir verða givnar so stundisliga sum gjørligt og vanliga minst 3 vikur frammanundan. Harumframt kann talan verða um, at tillutaðar tíðir verða tiknar aftur í sambandi við umvælingar og aðrar bráðfeingisstøður.
Stk. 2. Tímar, ið brúkarin missur, skal hann ikki gjalda fyri.
Stk. 3. Ikki er loyvt at framleiga tímar.

**Stongt í sambandi við halgidagar og halgidagslóggáva**
§ 10. Allar hallir eru stongdar hesar dagar:
Nýggjársdag
Páskadag
Hvítusunnudag
Jólaaftan
Jóladag
Nýggjársaftan frá kl. 12
Stk. 2. Ikki er loyvt at nýta hallir í stríð við halgidagslógina kl. 11 – 14, og ikki er loyvt at skipa fyri tiltøkum undir kirkjutíð.

**Gjald fyri hallarleigu**
§ 11. Sí galdandi prísskrá í fylgiskjali 1. Sí eisini galdandi reglugerð um ókeypis hallarleigu.
Stk. 2. Ávís høli kunnu lænast uttan gjald.

**Hvør kann læna høli**
§ 12. Hesi kunnu læna:
Feløg/felagsskapir
Persónar yvir 18 ár
Fyritøkur
Skúlar, frítíðarskúlar og aðrir almennir stovnar
Stk. 2. Fyri ikki fastar tíðir í pay-and-play skipanini er ikki krav um, at persónarnir búgva í kommununi. Kann fara fram eina og hvørja tíð, um tøkar tíðir eru. Tó er neyðugt at bíleggja minst 1 dag frammanundan, um ikki annað er ásett.

**Høli til fundavirksemi hjá feløgum, skeið, veitslur o.l.**
§ 13. Kantinan í Hoyvíkshøllini
Kantinan í høllini á Hálsi
Fundarhøli í høllini í Kollafirði
Fundarhøli í FIMI
Stk. 2.Til ber at leiga høli við at bíleggja á netbíleggingarskipanini.
Stk. 3. Leiðslan kann nokta leigu av høli, um tiltakið ikki hóskar til ávísu hølini.
Stk. 4. Til privatar veitslur er strangliga bannað at roykja inni, og leigarin hevur ábyrgdina av, at

hetta verður hildið.
Stk. 5. Í sambandi við heimadystir kunnu feløgini brúka kantinurnar til søluendamál. Í serstøkum førum kunnu tey eisini hava kantinuna til onnur tiltøk, ið kunnu vera í høllunum. Tó skal hetta avtalast við leiðsluna fyrst. Reglugerð verður gjørd fyri økið.

**Bílegging**
§ 14. Skal gerast á www.hallirvallir.fo

**Gjaldstreytir**
§ 15. Um ikki onnur avtala er gjørd, skal rindast frammanundan gjøgnum skipanina. Gjald fyri møguliga eyka tekniska útgerð, serliga uppseting o.a., mistar lyklar, eyka reingerð o.a. verður avroknað aftaná.

**Avlýsing**
§ 16. Tey, sum hava fingið tillutaðar hallartíðir, eiga uttan drál at fara inn í skipanina og melda frá, um einstakar tíðir ikki verða brúktar ávísa ferð ella sum heild.

**Skilhald o.a.**
§ 17. Venjing má bert fara fram í sjálvari ítróttahøllini, ítróttahølinum ella fimleikahøllini. Í forhøll, skiftingarrúmunum og gangum er bóltspæl og onnur venjing bannað.
Stk. 2. Ikki er loyvt at roykja í hølum hjá Ítróttaanleggum.
Stk. 3. Ikki er loyvt at hava rúsdrekka við í hølir hjá Ítróttaanleggum uttan serligt loyvi frá leiðsluni.
Stk. 4. Tann, ið leigar, skal tryggja, at tikið verður væl upp eftir brúk, og at væl verður farið um.
Stk. 5. Leigarin hevur ábyrgd av, at ítróttafólk og leiðarar halda ásettu reglurnar.
Stk. 6. Allir leigarar, tað veri seg feløg við limum ella teirra áskoðarar, skulu til eina og hvørja tíð rætta seg eftir ávísingum frá hallarvørði. Verða ávísingarnar ikki fylgdar, hevur leiðslan fyri høllina rætt til uttan ávaring at nokta einstaklingum eins væl og feløgum atgongd til høllina.
Stk. 8. Ikki er loyvt at hava djór við inn í høllina uttan serligt loyvi frá hallarvørðinum. Førarahundar eru undantiknir.
Stk. 9. Søla í hallunum er ikki loyvd uttan loyvi frammanundan frá Ítróttaanleggum.
Stk. 10. Skilhaldsreglur kunnu verða hongdar upp í ymisku høllunum og verða tillagaðar til hvørt høli.
Stk. 11. Brot av hesa leiðreglur verða revsaðar soleiðis: fyrst fellur ein munnlig ávaring; síðan ein skrivlig ávaring; og um endurtikið verður, verða persónar, lið, møguliga felag burturvíst úr einari viku upp til fleiri mánaðir.

**Praktisk viðurskifti innan ítrótt**
§ 18. Ítróttafeløg, ið leiga hallir, hava skyldu til:
1. At gera klárt til dystir og harvið at rudda av aftur. Áskoðarapláss skulu ruddast, skiftingarrúm skulu verða ruddað til næsta brúkara.
2. At venjarin tekur ábyrgdina av leikarunum og er síðsti persónur út úr høllini.
3. Eftir venjing kunnu leikarar brúka brúsur og skiftingarrúm, tó skal hetta vera innan rímiligar tíðir, í mesta lagi 30 minuttir. Tað er ábyrgdin hjá venjaranum at kanna, um øll omanfyrinevndu krøv eru fylgd.

**Praktisk viðurskifti innan konsertir og veitslur**
§ 19.
1. Ábyrgdina av uppsetan av palli, stólum, borðum v.m. hevur leigarin, við ávísing frá hallarvørðinum.
2. Vaktarfólk, atgongumerkjasøla, rudding og rættlag hevur leigarin ábyrgdina av.
3. Eftir tiltak skulu pallur, stólar, borð v.m. ruddast burtur og setast upp á pláss við ávísing frá vakthavandi.

4. Øll hølir, ið brúkt eru undir tiltakinum, so sum áskoðarapláss, kafeteria, vesir og garderoba, skulu ruddast, so klárt er hjá reingerðarfólki at vaska.
5. Leigarin skal halda ásettu krøv frá brunaumsjónini hjá Tórshavnar kommunu.

**Praktiskt viðurskifti innan fundir, stevnur og messur**
§ 20
1. Uppsetan av pallum, stólum, borðum og básum hevur leigarin ábyrgdina av.
2. Brunaplanur, stólauppsetanarplanur og básauppsetan skal leigarin koma við 14 dagar áðrenn tiltakið, og skal hetta góðkennast av Ítróttaanleggi saman við brunaumsjónini hjá Tórshavnar Kommunu.

**Ábyrgd og trygging**
§ 21. Fyri pengar, klæðir ella virðislutir annars átekur høllin sær onga ábyrgd.
Stk. 2. Leigarin er endurgjaldsskyldugur fyri tað, ið av hansara ávum misferst í ella uttan um høllina eins og fyri skaða, ið hendir í leigutíðini.

**Reingerð**
§ 22. Við konsertir, fundir, stevnur o.t. er reingerð ikki íroknað leiguna. Verður neyðugt at verja gólvið, ber leigarin útreiðslurnar av at leggja verjuna á og at taka hana av aftur, um eingin onnur avtala er gjørd.

**Atgongumerkjasøla**
§ 23. Leigarin skipar sjálvur fyri fólki til sølu av møguligum atgongumerkjum. Er neyðugt við politi-, bruna-, náttar-, ella aðrari vakt, syrgir leigarin sjálvur fyri í samráð við Ítróttaanlegg, at slík vakt kemur, og ber útreiðslurnar, ið standast av hesum.

**Lýsingar**
§ 24. Lýsingar eru ikki loyvdar uttan so, at Ítróttaanlegg frammanundan skrivliga hevur játtað hesar, undantiknir eru tó leikbúnar.
Stk. 2. Í sambandi við dystir kunnu feløg seta upp fyribils lýsingar á nærri tilskilað støð, ið frammanundan eru avtalað við Ítróttaanlegg.
Stk. 3. Í sambandi við dystir kunnu feløg brúka talgildu talvurnar til lýsingar, sbrt. nærri avtalu við Ítróttaanlegg.
Stk. 4. Kunning, lýsingar ella líknandi skulu ikki verða hongd upp ella sett fast í høllini innan ella uttandura, uttan at loyvi er fingið frá Ítróttaanleggum í hvørjum einstøkum føri.

**Gildiskoma**
§ 25. Hesar leiðreglur koma í gildi 10. juli 2017. Samstundis fara allar reglugerðir innan økið úr gildi.